Mjølnir–ÍF 1–3 (25–17, 17–25, 16–25, 19–25)

# ÍF vann greipuna

**ÍF sýndi í Klaksvík fleiri av orsøkunum til, at teir nú kunnu kalla seg greipuvinnarar. Eftir at hava tveitt nervarnar av sær, lótu fuglfirðingarnir ongan iva vera um, hvat var betra liðið**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD MENN

Meistaradeildin hjá monnum varð avgjørd í Klaksvík leygardagin. Mjølnir skuldi vinna dystin ímóti ÍF, um nakar spenningur skuldi vera eftir til seinasta leikdag næsta vikuskifti, men ÍF vildi tað øðrvísi.

### Mjølnir var favorittur

Fyrst í kappingarárinum var einki sum bendi á, at ÍF skuldi enda ovast. Tá vóru tað serliga Mjølnir og Fram, sum dystaðust um oddasessin. Mjølnir fór í jólafrí á odda, og sjálvt um munurin ikki var so stórur niður til hini liðini, so var nógv sum bendi á, at tað fór at eydnast Mjølni at vinna enn ein meistaraskap. Liðið spældi væl, og teir høvdu eisini neyðuga hepni við sær. Men seinna hálva hevur verið ógvuliga kørg hjá Mjølni. Liðið hevur ikki vunnið síðan 27. januar, og tá ið so ÍF í seinnu hálvu hevur vunnið allar sínar dystir, er avgerðin nú fallin.

### Dystargongdin

Stórt trýst lá á Mjølni til henda dystin. Kravið var ein sigur. Tað heila byrjaði sera væl. Uppstillingin varð broytt nakað, tí Borko spældi á miðjuni, og fyri hann á kantinum spældi Jógvan, sum annars vanliga hevur spælt hevari. Jóannes spældi diagonalur fyri Rúna, og henda uppstillingin tóktist virka væl. Mjølnir legði harðliga fyri í 1. setti, og ÍF fekk kærleikan at kenna. Blokkurin hjá Mjølni var sum ein livandi múrur og tók at kalla øll smash, sum ÍF royndi seg við. Borko og Trygvi á miðjuni hjá Mjølni smashaðu eisini sera væl, so tað sá út sum um, at Mjølnir hevði funnið uppskriftina til at vinna á ÍF.

Fyrst í 2. setti gekst eisini væl hjá Mjølni, men so fór ÍF-maskinan í gongd. Nógvar hevingar fara út á kantin hjá ÍF, og Kenneth og Boban spældu seg upp, og funnu hol í blokkinum hjá Mjølni. Tá ið ÍF fyrst hevði fingið spælið rættiliga at glíða, var dysturin avgjørdur. ÍF lovaði ongantíð Mjølni at koma fyri seg aftur, og teir stýrdu dystinum fullkomiliga, tað sum eftir var, sum settmunurin eisini greitt sigur. Besti maður á vølli var Kenneth Neshamar í ÍF.



*ÍF vann avgerandi dystin í Klaksvík, og staðfestu harvið støðu sína sum besta flogbóltslið í landinum. Fuglfirðingar kunnu nú kalla seg greipuvinnarar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Hví ÍF?

Hvussu ber tað so til, at tað júst gjørdist ÍF, sum vann føroyameistaraskapin í ár? Høvuðsorsøkin er helst Boban Ilic. Hann er sera góður leikari, men tað eru so nógvir hjá ÍF. Men Boban hevur megnað at fingið liðið at virka saman. Hann hevur vant liðið, og leikararnir eru væl fyri, og spælið gongur sera væl. Nakrir gamlir leikarar eru komnir aftur og saman við teimum ungu, hevur hetta ført til, at ÍF í ár hevur vunnið greipuna. At so hini liðini hava havt misjøvn úrslit, hevur sjálvandi ikki gjørt støðuna verri. Men ÍF er besta liðið í meistaradeildini hjá monnum, og vit ynskja teimum hjartaliga til lukku.

### Silvurstríðið

Nú ÍF stakk av við gullinum, eru silvurið og bronsan eftir at dystast um. Har liggja 3 lið framvið. Fram er í løtuni á 2. plássi. Teir hava 13 stig, men í hølinum á teimum er Fleyr, sum hevur 12 stig og Mjølnir hevur 11 stig, men teir mangla ein dyst ímóti SÍ. Sostatt er einki avgjørt enn. Fleyr og Mjølnir dystast leygardagin í Gundadalshøllini, og liðið sum vinnur fær heiðursmerki. Fram og ÍF spæla í Eysturskúlanum, og vinnur Fram, so fáa teir silvurið.

### Onnur úrslit:

Fleyr – SÍ 3 – 0
ÍF – Fleyr 1 – 3
SÍ – Fram 0 – 3

# Dráttur og Mjølnir framvegis stavn um stavn



*Dysturin um gullmerkini stendur millum Drátt og Mjølnir, og hóast munurin er so lítil, sum tilber, so er líkt til, at Dráttur hava trumfin á hondini*

**Tey bæði fremstu kvinnuliðini vunnu í hvør sínum lag 3-0 um vikuskiftið, og einki verður avgjørt fyrr enn á seinasta leikdegi**

FLOGBÓLTUR, MEISTARADEILD KVINNUR

Í meistaradeildini hjá kvinnum er framvegis spenningur. Dráttur og Mjølnir hava sína egnu kapping, og hon er so jøvn, sum hon nú einaferð kann vera. Dráttur var leygardagin í Havn og spældi ímóti Fleyr. Hesin dysturin hevði alstóran týdning, tí hann skuldi vinnast 3 – 0, og tað megnaðu kvinnurnar í Drátti. Fleyr var við í dystinum, men Dráttur er sterkari serliga í álopinum, og tí var lítil og eingin ivi um úrslitið.

Mjølnir hevði heimadyst ímóti ÍF, og har var als ongin ivi. Mjølnir sendi ÍF heim aftur við einum stórtapi, og Mjølnir vísir satt meistaraspæl nú. Øll mótstøða verður kveistrað burtur. Spell, at Mjølnir og Dráttur ongan dyst hava eftir hvørt ímóti øðrum, men kanska Drátturkappingin fellur soleiðis, at finalan verður millum hesi liðini. Tað kundi verið áhugavert. Seinasta leikumfarið er næsta vikuskifti, og tá spæla Fleyr og Mjølnir í Gundadalshøllini í Havn, og á Giljanesi spæla Dráttur og Fossanes. Dráttur hevur tí á pappírinum lættari uppgávu, men tað sigur so lítið.

Bronsustríðið stendur ímillum TB og ÍF, og dystur er á skránni næsta vikuskifti millum júst hesi liðini. Tað liðið sum vinnur fær bronsuna.



Tjaldur–StÍF 24–26 (10–11)

# StÍF ressast aftur

**Eftir at nøkur vánalig úrsliti hava verið í kjalarvørinum á steypasigrinum, fekk StÍF aftur ein sigur sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*John Petersen vónar, at niðurtúrurin hjá StÍF nú er steðgaður, og at strandingar aftur eru halda kós móti silvurmerkjunum*

Tað var ikki frítt, at runavíkingar høvdu góðar vónir undan dystinum móti StÍF sunnudagin. Stutt framman undan hittust liðini á Skála, og har eydnaðist gestunum at fáa annað stigið við sær.

Tann dysturin var samstundis byrjanin til ein lítlan niðurtúr hjá StÍF, sum eisini hevur viðvirkað, at tryggja silvurplássið av álvara er komið í vanda.

Tí var eisini neyðugt hjá strandingum at vinna, og hetta eydnaðist eisini, tó at tað at kalla allan dystin stóð rættiliga nógv á hjá steypavinnarunum.

Tað varð nevnliga ongantíð tann stóri munurin á liðunum báðum í dystinum. Í fyrra hálvleiki var størsti munurin ein trý mála stór leiðsla hjá útiliðnum, sum fekst í lag, samstundis sum Tjaldri varð rakt av nøkrum útvísingum.

Tað eydnaðist tó heimaliðnum at stríða seg upp á javnt, men í seinna fekk StÍF aftur ein lítlan fyrimun, sum teir hildu fast um, tað sum eftir var av dystinum.

### Á veg upp

Toppskjútti hjá StÍF í dystinum var afturvendi John Petersen, og yvirhøvur lat hann hampuliga væl at dystinum.

– Tað var javnt alla tíðina, og til tíðir stóð nógv á, men fyri tað mesta, so høvdu vit tó kortini munin, haldi eg.

– Í øllum førum gekk spælið betri, enn tað hevur gjørt í seinastuni, og hóast vit framvegis misnýta ov nógvar møguleikar, so haldi eg tó, at vit nú eru á veg upp úr aldudalinum, sum vit hava verið í síðani steypafinaluna.

Spurdur um strandingarnir nú av álvara fara eftir silvurmerkjunum, svarar John, at tað er hann so ikki í iva um.

– Hetta var vónandi fyrsta stigið á veg upp aftur, og nú gullmerkini meira ella minni eru farin, ætla vit okkum sjálvandi at royna eftir silvurinum, sigur John Petersen at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Tjaldur: Zoran Sarcevic 9(4), Sverri Justinussen 6(1), Tummas Magnussen 3, Dejan Mactic 3, Mortan Hansen 2, Arnfinn Langgaard 1
StÍF: John Petersen 9, Artur Johansen 7(7), Alexandur Johansen 4, Andre F. Danielsen 2, Bent Djurhuus 1, Costin Dumitrescu 1, Marius Joensen 1, Sveinbjørn Poulsen 1
Brotskøst: Tjaldur 7, StÍF 7
Útvísingar: Tjaldur 5, StÍF 4
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen.

# Flogbóltsvikuskifti á Giljanesi

**Endabresturin hjá vaksnu flogbóltsleikarunum verður vikuskiftið, 24. – 25. mars, á Giljanesi**

FLOGBÓLTSKAPPING
*Tíðiondaskriv*

Í Ítróttahøllini á Giljanesi verður vikuskiftið, 24. og 25. mars, skipað fyri árligu flogbóltskappingini hjá flogbóltsfelagnum, Drátti, fyri eldru lið. Hetta er samstundis seinasta flogbóltsvikuskifti vaksin í hesum kappingarárinum. Landskappingin endar komandi vikuskifti, og tá eru so allir vinnarar og taparar funnir. Flogbóltsspælarar hava nú høvi at hittast og spæla flogbólt, uttan at hava lands- og steypakapping at hugsa um. Leygarkvøldið verður dansur í Sørvági, har orkestrið, B&Z, spæla. Tilmelding skal fara fram í seinasta lagi innan hóskvøldið 15. mars kl. 21.00 á tlf. 333009 ella umvegis teldupost: elisabeth@oilwind.fo

## Flogbóltsúrslit

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 228 | 1K | Fleyr | Dráttur | 3-0 (25-18)(25-15)(25-8) | 10-03-01 |
| 229 | 1K | KÍF | Mjølnir | 3-0 | 10-03-01 |
| 230 | 1K | Nøvan | SÍ | 3-0 | 10-03-01 |
| 354 | 1M | Mjølnir b | SÍ | 0-3 | 10-03-01 |
| 355 | 1M | Fleyr | ÍF | 3-1 (17-25)(25-23)(26-24)(25-23) | 10-03-01 |
| 356 | 1M | Nøvan | NFL | 3-0 (25-16)(25-15)(25-18) | 10-03-01 |
| 454 | 2K | Fleyr | SÍ | 3-0 | 10-03-01 |
| 453 | 2K | Nøvan | Fossanes | 3-0 | |
| 455 | 2K | KÍF | ÍF | 3-0 | 10-03-01 |
| | 2M | Nøvan | SÍ | 3-0 | |
| 729 | D16 | Fleyr | SÍ | 3-0 (25-23)(25-16)(25-22) | 10-03-01 |
| 641 | G16 | Fleyr | Dráttur b | 0-3 (21-25)(21-25)(23-25) | |
| 640 | G16 | KÍF | Dráttur a | 3-0 | 10-03-01 |
| 642 | G16 | ÍF | TB | 0-3 | 10-03-01 |
| 54 | MK | ÍF | Fleyr | 3-0 | 11-03-01 |
| 55 | MK | Mjølnir | ÍF | 3-0 25-9 25-12 25-13 | 10-03-01 |
| 56 | MK | Fossanes | TB | 0-3 | 10-03-01 |
| 57 | MK | Fleyr | Dráttur | 0-3 (15-25)(13-25)(17-25) | 10-03-01 |
| 136 | MM | ÍF | Fleyr | 1-3 | 11-03-01 |
| 135 | MM | SÍ | Fram | 0-3 | 11-03-01 |
| 137 | MM | Mjølnir | ÍF | 1-3 25-17 17-25 16-25 19-25 | 10-03-01 |
| 138 | MM | Fleyr | SÍ | 3-0 (25-14)(25-18)(25-21) | 10-03-01 |

### Støðan, Meistaradeild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 15 | 11 | 4 | 37 | 21 | 16 | 17 |
| Fram | 15 | 9 | 6 | 35 | 25 | 10 | 14 |
| Fleyr | 15 | 8 | 7 | 28 | 25 | 3 | 12 |
| Mjølnir | 14 | 9 | 5 | 34 | 21 | 13 | 11 |

### Støðan, Meistaradeild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Dráttur | 19 | 17 | 2 | 55 | 13 | 42 | 25 |
| Mjølnir | 19 | 17 | 2 | 54 | 12 | 42 | 25 |
| ÍF | 19 | 8 | 11 | 27 | 39 | -12 | 13 |
| TB | 19 | 8 | 11 | 36 | 34 | 2 | 12 |
| Fleyr | 19 | 6 | 13 | 21 | 45 | -24 | 7 |

### Støðan, 1. Deild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 12 | 9 | 3 | 31 | 12 | 19 | 18 |
| Fleyr | 12 | 8 | 4 | 27 | 21 | 6 | 16 |
| Mjølnir b | 12 | 7 | 5 | 26 | 19 | 7 | 14 |
| Nøvan | 12 | 7 | 5 | 23 | 21 | 2 | 14 |
| Mjølnir a | 12 | 6 | 6 | 22 | 22 | 0 | 12 |
| SÍ | 12 | 3 | 9 | 14 | 28 | -14 | 6 |

### Støðan, 1. Deild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Fleyr | 10 | 8 | 2 | 27 | 10 | 17 | 16 |
| Nøvan | 9 | 6 | 3 | 20 | 14 | 6 | 12 |
| KÍF | 10 | 6 | 4 | 22 | 16 | 6 | 12 |
| Dráttur | 9 | 5 | 4 | 18 | 18 | 0 | 10 |
| SÍ | 10 | 3 | 7 | 15 | 22 | -7 | 6 |

### Støðan, 2. Deild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Nøvan | 8 | 5 | 3 | 19 | 13 | 6 | 10 |
| SÍ | 8 | 1 | 7 | 5 | 17 | -16 | 2 |

### Støðan, 2. Deild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| TB | 13 | 13 | 0 | 39 | 2 | 37 | 26 |
| Mjølnir a | 13 | 11 | 2 | 35 | 13 | 22 | 22 |
| KÍF | 14 | 10 | 4 | 33 | 17 | 16 | 20 |
| Fleyr | 14 | 8 | 6 | 30 | 22 | 8 | 16 |
| Nøvan | 14 | 4 | 9 | 21 | 28 | -7 | 10 |
| ÍF | 14 | 5 | 9 | 20 | 29 | -9 | 10 |
| SÍ | 14 | 3 | 11 | 10 | 35 | -25 | 6 |

### Støðan, Dreingir 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Fleyr | 9 | 7 | 2 | 23 | 10 | 13 | 14 |
| SÍ | 9 | 7 | 2 | 21 | 8 | 13 | 14 |
| TB | 9 | 3 | 6 | 11 | 18 | -7 | 6 |
| ÍF | 9 | 1 | 8 | 5 | 24 | -19 | 2 |

### Støðan, Gentur 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| KÍF | 9 | 8 | 1 | 26 | 4 | 22 | 16 |
| TB | 10 | 8 | 2 | 26 | 8 | 18 | 16 |
| Dráttur a | 10 | 7 | 3 | 22 | 11 | 11 | 14 |
| Fleyr | 10 | 3 | 7 | 9 | 23 | -14 | 6 |
| Dráttur b | 9 | 2 | 7 | 10 | 21 | -11 | 4 |
| ÍF | 10 | 1 | 9 | 3 | 29 | -26 | 2 |